# Heilsumálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 13. september 2023 |
| Mál nr.: | Skrivið her |
| Málsviðgjørt: | KG/BL |
| Ummælistíð: | Skrivið frá/til |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Kunngerð um broyting í kunngerð um ókeypis koppseting ímóti ávísum smittandi sjúkum**
(Kikhosta koppseting til barnakonur, HPV og strika ásetingar um koppingarevni í sambandi við koppseting ímóti influensa)

**§ 1**

Í kunngerð nr. 151 frá 29. oktober 2020 um ókeypis koppseting ímóti ávísum smittandi sjúkum, sum seinast broytt við kunngerð nr. 135 frá 24. oktober 2022, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 4 verður fyrsta punktum orðað soleiðis: ”Gentur í aldrinum 12-17 ár kunnu verða koppsettar ókeypis ímóti humant papillomavirus HPV.”

**2.** § 5, stk. 2 verður strikað.
Stk. 3, sum verður stk. 2, verður orðað soleiðis:

”*Stk. 2.* Koppsetingin verður veitt børnum í aldrinum 2 til 6 ár samsvarandi vegleiðing frá Sundhedsstyrelsen. Tað merkir sum meginreglu, at koppsetingin verður veitt sum ein nasal influensukoppseting.”

Stk. 4 verður hereftir stk. 3.

**3.** § 8 verður orðað soleiðis:
”**§ 8.** Barnakonur kunnu verða koppsettar ókeypis ímóti kikhosta frá 24. barnsburðarviku at rokna.”

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi 1. oktober 2023.

Heilsumálaráðið, 14. september 2023

**Margit Stórá**
landsstýriskvinna

/ Turid Arge